BORÐTENNIS

hvussu óskiljandi hann metir tað vera, at valið ongantíð er fallið á eina multi-høll.

– At man ikki hevur tikið við leistinum um at byggja eina miðstøð, komi eg nokk ongantíð at skilja. Heldur velur man her í Føroyum at byggja stórar hallir til hvørja einstaka ítróttargrein. Og tá sigur tað seg sjálvt, at onkur er fremstur í røðini og onkur er aftastur í røðini. Eg havi sagt tað fyrr, at Tórshavnar kommuna hevur gjørt eitt gott arbeiði at uppstiga ítróttargreinar í kommununi. Men nú tykist stígur at vera komin í og kommunan hevur ikki loyst trupulleikarnar hjá eitt nú bogaskjóting, judo og borðtennis. Hetta kanst tú jú ikki loyva tær sum kommuna, ið skal vera um allar borgarar og allar ítróttargreinar. Lyftið um hølisloysn stendur við, og við hesum stendur lyftisbrotið eisini við, sigur Peter.

Kann doyggja

Borðtennis í høvuðsstaðnum er í lívsvanda og hevur tørv á bráðfeingis hjálp. Tørvur er á einari høll, sum nøktar tørvin viðvíkjandi eftirspurningi til venjing, venjingarumstøðum, felagsskapi og mongum øðrum fyrimunum, sum í dagsins ítróttarheimi í stóran mun eru sjálvsagdir.

– Lækkandi luttakaratalið boðar týðiliga frá, at nú er eitt lágmark rokkið, ið ikki skal lækka meir, tí annars doyr borðtennisítróttin í Tórshavnar kommunu, sigur Peter bersøgin og droymir um betri umstøður:

– Betri hølisumstøður høvdu givið møguleika fyri fleiri venjingum um vikuna. Eisini kundu vit skipað venjingina øðrvísi, t.d. í minni og fleiri bólkum, sum høvdu ymisk krøv til venjing og ymsar fyritreytir til venjing, metir Peter, sum venur unglingar í ymsum árgangum á ymiskum støði í trongligari skúlahøll.

– Eisini hevði verið høvi at havt foreldra-borðtennis, sum so aftur kundi givið tilfeingi til fleiri leiðarar í felagnum, ið kundu tikið sær av ymsum uppgávum so sum at útvega pening til felagið o.s.fr. Í búskaparmáli tosar man ofta um multiplikatoreffekt ella ringvirkningar av einhvørjum búskaparligum átaki, ið verður sett í verk. Henda myndin haldi eg vísur best, hvussu betri hølisumstøður høvdu havt jaliga ávirkan á borðtennisítróttina í Tórshavnar kommunu, sigur Peter.

Eiga tørn

Eftir hondini eru leikarar og venjarar ikki nógvir í tali í borðtennisfelagnum í Havn, og tískil er tað ein upplagdur spurningur, um menniskjaliga tilfeingið í felagnum hevði megnað at rikið tað virksemið og tær uppgávur, sum krevjast fyri at hava egna høll.

– Vit hava ikki fingið roynt okkum í at svara hasum spurningi, tí vit hava ikki møguleika at hava so nógvar leikarar til venjingar við teimum umstøðum, sum eru. Sjálvandi seta nýggj og størri høli krøv til felagið, men vit eiga í øllum førum at fáa møguleikan at svara hasum spurningi, heldur Peter.

Hann er sannførdur um, at borðtennis og aðrar smærri ítróttargreinar nú eiga tørn.

– Sum áður sagt, so eru flestu ítróttargreinar upprøðfestar, og nú haldi eg, at tær fáu smáu ítróttargreinar, ið eftir eru, eiga tørn. Tað er sera einfalt í mínum hugaheimi. Annars stýrir tú sum kommuna hvørji ítróttartilboð skulu vera, og soleiðis haldi ikki at tað eigur at vera. Kommunur skulu skapa karmar, meðan ítróttarfeløg geva ítróttartilboðunum innihald í teimum kørmum, sum kommunan skapar, sigur Peter H. Niclasen at enda.

albinus@sosialurin.fo

Ítróttaanlegg í Føroyum

Íðkandi: 15.633

Fótbóltsvøllir: 22
Sparkivøllir: 107
Ítróttarhallir: 16
Fimleikahallir: 4
Skúlahallir: 37
Svimjihyljar: 19
Rennibreytir: 2
Ríðibreytir: 4
Skjótibreytir: 3
Tennisvøllir: 3
Bogaskjótibreytir: 0
Judohøll: 0
Borðtennishøll: 0
Golfvøllur altj.: 0

Kelda: ÍSF (juni 2015)